


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Útbúgving er avgerandi fyri framtíðina



Val X

BÁRÐUR POULSEN
Fólkaflokkurin

**Skúlaverkið er eitt av okkara tydningarmiklastu evnum at taka upp aftan á næsta val**

Fólkaskúlin er grundleggjandi fyri samfelagið. Seinasta Pisa – kanningin vísir, at okkara fólkaskúli ikki er í fremstu røð. Tí mugu vit raðfesta fólkaskúlan frammarlaga komandi valskeið. Vit mugu dagføra læraraútbúgvingina soleiðis at hon frameftir verður á universitetsstigi. Neyðugt er at vit raðfesta leiðsluleiklutin í skúlaverkinum sum heild, soleiðis at vit fáa professionellar leiðslur á skúlunum. Leiðsla er eitt fak, eins og øll onnur fak í samfelagnum, og leiðslufatanin sum held í samfelagnum er avgerandi fyri okkara framtíð. Harumframt er neyðut at fara aftur til stigbýtta undirvísing, t.d. við víðkaðum- og grundstigi, soleiðis at lærarin kann møta næminginum á tí stigi, sum hann nú einaferð er á.

Okkara landsstýrismaður í mentamálum hevur loyst flestu hølistrupuleikarnar á miðnámsskúlaøknum, eftir ein átrokandi tørv í ártíggjur. Tað eru bert hølisviðurskiftini hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, sum eru eftir at loysa. Hølisviðurskiftini hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði skulu loysast í komandi valskeiði. Haldi eisini at vit eiga at fáa ein skúla her á landi, sum kann undirvísa børnum við atferðartrupuleikum. Í grannalondum okkara eru slíkir skúlar, sum undirvísa børnum innan ymisk viðurskifti, sum tey eru góð til. Tá ið tey eru búgvin, fer lærarin út á arbeiðsmarknaðin og finnur teimum eitt hóskandi arbeiðið. Hetta verður gjørt í staðin fyri at tey annars høvdu verið noydd at verða heima alt sítt lív við teimum fylgjum, at samfelagið skuldi tikið sær av teimum. Vit vilja arbeiða fyri at raðfesta alt skúlaøkið høgt í komandi valskeiði.

Gev mær álit frá tær so vil eg arbeiða fyri hesum.

# Sandoyartunnilin 2013 ella avlíving av Sandoynni



Val X

JOEN PETER PETERSEN
Valevni Sambansflokksins

Nú síðani Sandoyartunnilin bleiv samtyktur á løgtingi, hevur man neyvan opnað eitt blað ella lurtað útvarp, at man hoyrir, at hann er ov dýrur. Jú tað er hann nokk!!!!! onkur sigur, at hann skal bíða, men tað virkar sum um at tað er ójavnar meiningar um tunnilin í flokkunum, summir vilja hava onnur ikki. Reidar Nónfjall sigur eitt, Rúna Sivertsen eitt annað, og tann triði persónurin eitt heilt annað. Eg haldi, at tunnilin er blivin ein ordiligur stemmufiskari.

Hvat við at komið við einari loysn um, hvussu vit skula gera hann og fíggja hann, heldur enn at hakka inn á hvønn annan?

Men eitt er vist, at meginparturin av teimum sum rópa um at tunnilin skal útsetast, eru fullvelldisfólk, sum vilja niðurskera blokkin. Teir somu menn, sum blakaðu 366 millónir (ferðir eitt vist áramál) vekk, sum vit kundu havt bygt fleiri tunlar fyri og kundu havt fornýggjað teir gomlu, men tað er ofta ein beiskur biti at slúka, at hoyra sannleikan. Vita teir ikki, at tað kostar meira at skipa Føroyar sum fullveldi, enn tað hevði kostað at borað ein Sandoyartunnil um árið?

Undirskriftir verða samlaðar, men tað sum undrar meg er, at mong av teimum, sum tala ímóti hesi ætlan, eru somu fólk, sum vilja gera Føroyar til fullveldi.

Við einum ryggi sum ein reyð kóka pylsa (citat Heidi Petersen) kemur Tórbjørn Jacobsen við einum brokmanslestri um at strika Sandoynna og Vágar. Eg haldi at hann skuldi bara komið suður nú á Sandoynna, so kundi hann sløkt kontaktina sum síðsti maður á Sandoynni og selt M/F Teistan, so fekk hann nakrar milliónir í kassan. Man sær, at maðurin hevur sitið í andstøðu og skal bjarga sínum egna skinni til komandi val. Sjálvandi ein altjóða flogvøll á Skorðhæddini. Stemmufiskarí av rang.

Fyri meg er tað púra líka mikið hvar ein flogvøllur liggur. Sjálvandi vildi eg ynskt at hann lá í Søltuvík, men vissi ikki tað er gott nokk, ja so byggir man hann ikki har, man byggir hann, har tað er skilabest at gera hann.

# Demokratiskt Demokratia?



Val X

BJARTI MOHR
Fólkaflokkurin

Í útvarpinum í dag vóru tvey valevni frammi við spurninginum um at privatar fyritøkur fíggja valstríðið hjá summun politikarum. Kenni sjálvur onki dømi til hetta fyribrygdi í Føroyum. Gjaldi mítt valstríð sjálvur. Men til tey, vil eg siga, at antin má tað vera sum nú, nevnliga, at hvørt valevni brúkar ta støðu, sum hann ella hon hevur í samfelagnum og t. v. s. kann brúka hetta politiskt. Ella skulu heilt greiðar reglar setast upp fyri, hvør ið kann stilla upp og hvussu eitt valstríð skal fara fram og hvussu tað verður fíggjað.

Eitt annað dømi, sum eg haldi er nógv meira aktuelt, er Demokratia. Har er forkvinnan stillað upp til komandi løgtingsval. Demokratia er á fíggjarlógini t. v. s. tað er skattgjaldarin sum rindar hetta annars góða átak. Forkvinnan sleppur at profilera seg í fjølmiðlunum upp á nakkan á Demokratia. Hetta sleppa øll hini kvinnuligi valevnini ikki. Skal nøkur meining vera við Demokratia, so eiga tey t. d. at seta eina felagsmynd av øllum kvinnuligu valevnunum í bløðini og ella á annan hátt at profilera allar kvinnurnar sum stilla upp og ikki bara forkvinnuna.

Annars Gleðilig Jól øll somul!

# Løgtingsvalið januar -2008 snýr seg ikki um nýggjan flogvøll



Val X

EGIN HENRIKSEN
Miðflokkurin

Um bygging av nýggjum flogvølli hevur slíkan bráskund, sum nú verður roynt at billa fólki inn, beint upp undir jól og bara tí at val stendur fyri durum, so skuldi ein trú at okkurt veruligt var gjørt við hetta í nú brátt farna valskeiði.

Nei, sum so ofta fyrr so eru summir politikkara serfrøðingar í at leggja roykskíggj, at avleiða tankarnar hjá veljarum at fáa teir at gloyma politiskt svans, gamlar syndir og teir veruligu trupulleikarnar.

Hjá fleiri politikkarum og flokkum kundi tað verið hent fyri afturveljingina, at veljarin t.d. gloymdi mál sum 266b.

**Nei hesuferð snýr valstríðið seg um virðir, um moral, etikk og hvønn veg tjóðin skal fara.**

Ongantíð áður hava tað veri so frek og grov álop á tað, sum landið og forfedrar okkara bygdu tilveru sína á og hildu heilagt.

Tað føroyska samfelagið bleiv ikki bygt av einum ættarliðið. Eitt so gott samfelag, sum tað føroyska, hevur kosta offur og sveitta frá fleiri ættarliðum. Gudsóttandi menniskju hava við bøn og arbeiði bygt eina mentan, sum hevur rúma bæði frælsi og tryggleika.

Men menturnaroyðandi brennivargar eru nú í fult sving. Teir hugna sær við, at síggja eina mentan fara upp í logar.

Í einum samfelag eru ta tvær basalar funktiónir, ið mynduleikarnir mugu skapa rættarliga verju um: ”tær eru samlív og reproduktión”. Uttan nó stóra reproduktión vil mentanin doyggja út. Tað sigur seg sjálvt.

Uttan at samfelagið raðfestur og verjur lívslangt samlív millum ein mann og eina kvinnu, letur man upp fyri kaos-kreftunum. Tær herja frítt og skræða familjur sundur.

Lógir eru týdningarmiklar. Týdningarmiklari enn nógv hava givið sær far um. Tær leggja grundvøllin í samfelagnum og prega rættsfatanina hjá fólki og harvið eisini atferðina. Tey, ið vilja kollvelta samfelagið, dríva tí eina beinharða lobbyismu fyri at broyta lógarverkið. Dømir finnast um lond og samfeløg - mætari enn Føroyar, ið eru dottin sundur vegna rot innan í frá.

**At siga at Gud ikki skal blandast upp í politikk er tokutala.**

Um tú hevur eina trúgv, og hon ikki sæst aftur í gerandisdegnum, so er hon eingin trúgv. Okkara tjóðareyðkenni/samleiki er, um onkur skuldi havt gloymt tað, tann blóðreyði krossurin í flagginum og tjóðsangurin - Tú alfagra land mítt – ein perla, ið er ein bøn og lovsangur til Skaparan. Hevur tú – góði lesari nakrantíð hugsa um hvussu tað ber til, at vit í Føroyum yvirhøvur hava okkara egna talu og skriftmál ? og hvar vit annars høvdu veri í dag, um mál okkara var útdeytt, sum tað vóru øll tekin í sól og mána um, at tað fór at gera ? Tað er so skjótt í dag at reka av leið í tí meldrinum, sum er rundan um okkum.

**Táið sjálvur grundvøllurin verður uppskræddur, hvat fær tá hin rættvísi gjørt! www.biblian.fo**

Eg bjóði meg fram, sum valevni til løgtingsvalið á listanum hjá Miðflokkinum.

Um tað eydnast mær at verða valdur, fari eg at leggja alla orku í at ávirka lógarsmíð og samfelagsgongd soleiðis, at lóg og landaskil skal valda á øllum samfelagsøkjum, og fari eg at stríðast móti ómorali og órættvísi, har eg síggi tað verða framt.

Annars er tað alneyðugt í einum landshúsarhaldi eins og í tí privata húsarhaldinum, at samsvar er í millum inntøkur og útreiðslur.

Vit í Miðflokkinum vilja reka ein varligan fíggjar- og búskaparpolitikk og vilja menna hetta samfelagið eftir føroyskum fyritreytum.

Tú finnur meg á lista H